Góðan dag og vælkomin til kappingina fyri skapandi vinnur, Creative Business Cup.

Í dag skulu fimm fyritøkur leggja fram sínar slóðbrótandi vørur ella tænastur fyri okkum og kappast um at gerast føroyska umboðið í altjóða finaluni í Creative Business Cup, sum verður í Keypmannahavn í november.

Kappingin varpar ljós á tær vinnurnar, sum eru grundaðar á evnini hjá fólki at finna uppá, at skapa nýggjar og spennandi upplivingar og at gagnnýta bæði náttúrutilfeingi og nýggja tøkni til at loysa dagsins avbjóðingar.

Hetta er ein kapping um at vera nýskapandi i orðsins rætta týdningi. Fyritøkan, sum vinnur, skal bæði hava funnið upp á eina nýggja kreativa vøru ella tænastu og samstundis sannføra dómararnar um, at ætlanin kann gjøgnumførast og at hon hevur møguleika at standa seg og vaksa á altjóða marknaðinum.

Eg vil nýta høvi til at takka fyriskiparunum av kappingini. Eins og undanfarin ár hava Vinnuframi, Hugskotið og Íverksetarahúsið samstarvað um føroysku luttøkuna í Creative Business Cup, og nú telist Fróðskaparsetrið eisini millum fyriskipararnar. Setrið hevur av álvara sett nýskapan og íverksetan á breddan, og hevur sett á stovn serstakan depil fyri nýskapan. Eisini veit eg, at Setrið gongur á odda at samskipa tað arbeiðið, sum íverksetarahúsið, Ungt virki og onnur gera fyri at undirvísa og menna íverksetarahugburð í allari útbúgvingarskipanini.

Tí royndir vísa, at undirvísing í íverksetan og nýskapan munar. Tey, sum hava fingið frálæru í íverksetan og nýskapan, gerast oftari íverksetarar enn tey, sum ikki hava lært um íverksetan í skúlanum. Og best er, um tey byrja at læra um íverksetan longu tíðliga í barnaskúlanum, og um frálæran heldur fram og mennist øll skúlaárini, bæði í fólkaskúlanum, á miðnámi og á hægru útbúgvingunum.

Hetta er kanska ikki so løgið, men henda vitanin ger kortini upp við gamla fordómin um, at allir rættir íverksetarar eru føddir íverkstarar, sum ikki tørva nakra tileggjan.

Soleiðis er tað ikki. Summi eru sjálvandi føddir íverksetarar, onnur verða tað av tilvild, og aftur onnur fáa hug at seta nýggjar fyritøkur á stovn, tí at tey hava lært um íverksetan ígjøgnum útbúgvingarskipanina og hava fingið vitan, amboð og áræði til at loypa út í tað.

Tað er helst sum við føroyskum listafólkum. Fyrstu føroysku listafólkini vóru tey fáu, sum bara ikki kundu lata vera. Tey skapaðu sína list, hóast eingin í samfelagnum skilti tey ella virdi tað, sum tey tókust við, og tey hildu á, hóast tað ikki gav nakra líkinda inntøku og hóast eingin sá tað sum rættiligt arbeiði.

Men sum frá leið mentist hugburðurin til list, og í dag nemur hópin av ungum fólkum sær góðar listarligar útbúgvingar. Tey eru nógv, sum megna at gera tað til sín vinnuveg og tey standa seg sera væl, bæði heima og í útlondum.

Í dag haldi eg, at hugburðurin til íverksetarar er á góðari leið í Føroyum. Tað er tó ikki lætt at vera íverksetari, og als ikki hjá teimum í skapandi vinnunum, sum siðbundnu vinnulívsfólkini og íleggjarar lítið og einki kenna til. Frá almennari síðu mugu vit tí alla tíðina spíla okkum út og bøta

um karmar, fíggingarmøguleikar og ráðgeving, so íverksetarar hava so góðar møguleikar sum til ber at fremja sínar ætlanir.

Tí okkum tørvar fleiri nýskapandi fólk og íverksetarar enn nakrantíð. Eingin kann í dag siga, hvussu arbeiðsmarknaðurin sær út um 20 ár, 10 ár ella bara 5 ár. Alheimsgerðin kollveltur vinnur, minkar um tørvin á arbeiðsmegi í nøkrum vinnum og gevur møguleikar at skapa heilt nýggj størv aðrastaðni.

Tey, sum eru ung í dag, mugu rokna við, at nógv teirra skulu skapa sær síni egnu størv og menna nýggjar fyritøkur. Ikki minst tey, ið velja at nema sær kreativar útbúgvingar, har tað ofta er langt millum føstu størvini. Tey mugu tí læra at brúka sínar førleikar til at skapa nýggjar loysnir, upplivingar ella vørur, sum onnur vilja gjalda fyri.

Vivino, sum Heini Zachariassen hevur gjørt til heimsins størstu vínapp, er eitt tað besta dømi um, hvussu ein - heilt frá berum - kann kollvelta eina so siðbundna vinnu sum vínmarknaðin einans við hugflogi, kreativiteti og avbera góðum íverksetaragávum.

Henda kappingin er gjørd fyri at varpa ljós á skapandi vinnurnar og fyri at fagna teimum, sum bæði duga at finna upp á og at fremja í verki. Creative Business Cup skal geva fleiri kreativum fólkum hug til at gerast íverksetarar og vónandi verður kappingin við til, at íleggjarar og siðbundin vinnulívsfólk síggja møguleikarnar í skapandi vinnunum.

Endamálið við hesi kapping er eisini, at hon skal vera gevandi og mennandi hjá øllum teimum, sum luttaka, og ikki bara hjá fyritøkuni, sum fær handað vinningin frá hansara kongliga tigni Fríðrikki krúnprinsi.

Við hesum fáu orðum, fari eg at ynskja tykkum øllum góða eydnu og eina framúr góða kapping.

Takk fyri.